Stuðulsfólk

Vegna ov fáar umsóknir, lýsa vit av nýggjum eftir stuðulsfólki til ungan mann í Tórshavn.

Arbeiði hjá stuðlinum verður í neyvum samstarvi við mannin sjálvan, familjuna og Almannastovuna, og fevnir um at fara við honum til svimjing og onnur skipaði tiltøk.

Arbeiðstíðin er 12 tímar um vikuna seinnapart og kvøld.

Setunartíðin er frá 15.02.00 og fyribils til 30.06.00.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja til 31 48 22, Ragnhild Dahl.

Umsóknir mugu verða okkum í hendi í seinasta lagi 31.01.00 og skulu sendast til:

Almannastovuna
att. Ragnhild Dahl
Box 196
110 Tórshavn

Avloysari til skrivstovustarv

S&K-felagið søkir eftir avloysara fyri skrivstovufólk, ið skal í barnsburðarfarloyvi.

Arbeiðið umfatar í høvuðsheitum at upplýsa limum felagsins um fakfelagsviðurskifti t.v.s. sáttmálan og viðkomandi lógir so sum lógina um starvsmenn, frítíðar- og lærlingalógina.

Tann, ið settur verður, kemur at byrja um 1. februar 2000 og er arbeiðstíðin frá 9.00-12.00.

Løn sambært S&K-sáttmálanum.

S&K-felagið

Kvinnufimleikur á Oyrarbakka

Treytað av nóg stórari luttøku, skipar kvøldskúlin fyri hesum skeiðum:

Motións fimleikur	Týsdag 20.30-21.30
Motións aerobic	Týsdag 21.30-22.30

Tilmelding og upplýsingar hjá Fanny Kruse, lærara, tlf. 422437. Byrjað verður í viku 3.

Felagsskúlin á Oyrarbakka
Tlf. 42 20 84

Dansifrøi

Ársveitsla

Ársveitslan verður í Hoydølum leygarkvøldið 22. januar 2000.
Borðhaldið byrjar kl. 19.30. Orkestur spælir til dans.

Atgongumerki, sum kosta 250 kr., fáast til keyps í Mótaskálanum í Dr. Jakobsensgøtu ella hjá nevndarlimunum.

Avgjørt seinasta freist at keypa atgongumerki er **mikudagin 19. januar.**

<u>**Ársaðalfundur**</u>
Mint verður eisini á ársaðalfund felagsins, sum verður sunnudagin 30. januar 2000, kl. 15.00, á Hotel Hafnia.

Við dansikvøðu NEVNDIN

50 ára stovningarveitsla hjá Havnar Handverkarafelag

Í sambandi við at Havnar Handverkarafelag verður 50 ár leygardagin 12. februar 2000, verður skipað fyri veitslu í B36-húsinum, kl. 19.00.

Atgongumerki til veitsluna kunnu bíleggjast á tlf. 211540 og 211548 í seinasta lagi leygardagin 5. februar 2000.

Nevndin

Starvsfólk til JT-Electric P/F

Føroyska vinnulívið er í støðugari menning. Framgongd er á nógvum økjum og av somu orsøk hevur P/F JT-Electric meira enn vanligt at gera. Vit hava brúk fyri góðum fólki at hjálpa okkum at tæna kundum okkara enn betur, tí søkja vit eftir fólki til hesi størv:

Sølu/goymslumaður

***Uppgávur**:*
- Hava ábyrgd av goymsluni
- Seta goymslustýring í verk
- Hava ábyrgd av at vørur til projekt eru tøkar til tíðina
- Víðka um sambandið við verandi veitarar og viðskiftafólk
- Finna nýggjar veitarar og vørur
- Marknaðarføra vørur og tænastur

***Førleikakrøv**:*
- Hava eina handilsliga útbúgving.
- Kunna arbeiða við fleiri tingum samstundis
- Hava hug at handla
- Verða nærlagdur
- Kunna tosa og skriva enskt á handilsstøði, kunnleiki til onnur mál er ein fyrimunur
- Hava góð samstarvsevni og vera fyrikomandi.

Løn eftir kvalifikatiónum

Stýringar og instrumentering

P/F JT-Electric hevur brúk fyri einum dugnaligum verkfrøðingi til projektering við stórari processtekniskari vitan innan hesi øki:

Uppgávur:
- Processtekniskt lay–out
- Projektering og eftirlit
- Teknisk dokumentation
- PLC – stýringar
- SRO-anlegg

Førleikakrøv:
- El-verkfrøðingur, sterkstreymsteknikari, el-installatørur, elektronikkmekanikari ella líknandi tekniska útbúgving
- Holla tekniska bakgrund
- Royndir í at projektera processautomatión
- Nærlagdur við at dokumentera projektir og konstruktiónir
- Kunna tosa og skriva enskt rímiligt
- Hava góð samstarvsevni og vera fyrikomandi

Løn eftir kvalifikatiónum

Lærlingar

P/F JT-Electric setur vanliga nakrar elektrikaralærlingar gjøgnum árið.
Gjøgnum lærutíðina geva vit lærlingum okkara eina so breiða fakliga vitan og so stórar avbjóðingar sum møguligt innan el-fakið.

Førleikakrøv:
- Hava eitt gott fólkaskúla prógv
- Verða áhugaður í el-tøkni
- Verða arbeiðsamur og nærlægdur
- Hava góð samstarvsevni og vera fyrikomandi.

Upplýsingar um størvini

Um tú vilt vita meira um størvini er tú vælkomin at seta teg í samband við Virkisráðgeving Sp/f og tosa við **Símun Hammer, tlf. 44 95 91.**

Skrivligar umsóknir

Áhugað verða biðin um at senda skrivliga umsókn í seinasta lagi 28. januar 2000. Umsóknirnar skulu merkjast ávikavist:
"jt-goymsla"
"jt-stýringar"
"jt-lærlingur" og skulu sendast til:

Virkisráðgeving Sp/f
Postboks 26
600 Saltangará

***P/F JT-Electric** er eitt el-virki við bústaði í Fuglafirði, virkið hevur 25 ár á baki. Arbeiðsøkið hjá virkinum í dag er at veita vørur og tænastur til tann føroyska ídnaðin. Virkið framleiðir m.a. undirvatnsljós, ið verða nýtt av alarum í Føroyum og uttanlands.*

Stuðulsfólk

Vegna ov fáar umsóknir, lýsa vit av nýggjum eftir tveimum stuðulsfólkum til 39 ára gamla kvinnum, sum býr í Vágunum, og situr í koyristóli.

Arbeiði verður gjørt í samstarv við kvinnuna sjálva og Almannastovuna. Arbeiði hjá stuðlinum er millum annað, at hjálpa kvinnuni við ymiskum praktiskum uppgávum inni. Koyra hana, tá hon skal út, fara við henni til ymisk tiltøk og annars hjálpa henni við slíkum, sum hon vegna sjúkuna ikki er før fyri at gera longur.

Arbeiðstíðin er tilsamans 25 tímar um vikuna fyri báðar stuðlarnar. Byrjað verður at arbeiða umleið á miðdegi og út á dagin/kvøldið. Eisini kann verða arbeitt stytri tíð onkur vikuskifti. Tann fyrsta mánaðin verður serligur dentur lagdur á, at taka støðu til, hvussu býti av tímunum skal verða millum stuðlarnar. Setunartíðin er fyribils 6 mánaðir.

Neyðugt er, at tann, ið settur verður, hevur koyrikort.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja til 31 48 22, Ragnhild Dahl ella Minnu Jacobsen, tlf. 31 54 80 millum kl. 9-13, tó ikki mikudag.

Umsóknir mugu verða okkum í hendi í seinasta lagi 31.01.00 og skulu sendast til:

Almannastovuna
att. Minna Jacobsen
Box 196
110 Tórshavn

Deildarlei›ari til ALS

Starvi› sum deildarlei›ari á
Tryggingar- & ávísingardeildini er leyst at søkja

Høvu›suppgávan hjá deildarlei›aranum er í gó›um samskifti vi› starvsfólki› at lei›a og skipa dagliga arbei›i› á deildini.

Tryggingar- & ávísingardeildin, sum í løtuni hevur 11 starvsfólk, umsitur:

- Vanligan arbei›sloysisstu›ul,
- fiskavirkisskipanina,
- arbei›sávísing,
- førleikagevandi tiltøk,
- farloyvisstu›ul,
- flyting millum A-kassar og
- arbei›sloysistrygging fyri sjálvstø›ug vinnurekandi.

Starvi› er avbjó›andi og krevjandi. Deildarlei›arin skal tí hava hóskandi útbúgving og gó›ar starvsroyndir, umframt hava gott innlit og áhuga í føroyska arbei›smarkna›inum.

Vi›komandi skal vera førur fyri og hava hug til framhaldandi at menna tænastustø›i› hjá deildini.

Arbei›sloysisskipanin stendur stø›ugt fyri broyttum arbei›sfortreytum, og skal deildarlei›arin hava evnir at tillaga seg broytingum í arbei›sumstø›unum.

Deildarlei›arin myndar, saman vi› deildarlei›aranum fyri Fíggjar- & fyrisitingardeildina og stjóranum, dagligu lei›sluna á Arbei›sloysisskipanini.

Løn sambært avtalu.

Starvi› ver›ur at seta sum skjótast. Skrivlig umsókn vi› avriti av prógvum og møguligum vi›mælum skal ver›a Arbei›sloysisskipanini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 21. januar 2000. Nærri uppl‡singar fáast vi› at venda sær til Allan Skaalum ella Elisabeth O. Gaardbo á tel. 318396, lokal 137.

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stu›ul til arbei›sleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbei›sleysum at fáa arbei›i og at umsita arbei›sávísing fyri føroyska arbei›smarkna›in. Á ALS starvast í løtuni 22 fólk. Virksemi› hjá ALS er í høvu›sheitum lógarásett. Ovastu lei›sluna hevur st‡ri› fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbei›sgevara- og løntakarafeløgunum á arbei›smarkna›inum - ver›ur valt av Føroya Landsst‡ri.

ALS
Arbei›sloysisskipanin
P.O.Box 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 319550 • Fax 310263
teldupostur: als@als.fo

Lærlingur

Søkt verður eftir lærlingi til plátu- og málaraverkstað okkara, at byrja sum skjótast. Er áhugi fyri handverkaraútbúgving við góðum framtíðarmøguleikum, so send okkum eina skrivliga umsókn.

Partur av frálæruni er á donskum skúla, tískil krevst lokið 10. floks prógv ella samsvarandi prógv.

Merk brævbjálvan: Plátusmiðjur

Ford

P/F WENZEL - FORD
Postsmoga 3043
110 Tórshavn
Tlf. 313873

Halt **sosialin**

Handverkara-útbúgving

Skeið í SMD-Lodding
31/1-2/2 og 2/2-4/2 2000

Undirvíst verður í:	SMD Lodding
Skeiðleiðari:	Søren Knudsen frá EUC-Syd
Skeiðkostnaður:	2.250 kr.
Tilmelding:	***áðrenn 21/1-2000***

Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúlan á tlf. 311957 (mánadag-fríggjadag, kl. 8-12 & 13-16).

Tekniski Skúlin í Tórshavn
Marknagilsvegur 75 • Boks 239
FO-110 Tórshavn
E-mail: tst@post.olivant.fo

Stuðulsfólk

Vegna ov fáar umsóknir, lýsa vit av nýggjum eftir stuðlsfólki til 16 ára gamlan drong í Eysturoynni.

Arbeiði hjá stuðlinum verður í neyvum samstarvi við drongin sjálvan, familjuna, Almannastovuna og onnur fakfólk, og fevnir um at fara við honum til ymisk tiltøk og venjingar, so sum fysioterapi, svimjing, ríðing og annars vera við til at geva honum ein innihaldsríkan gerandisdag.

Arbeiðstíðin er 27 tímar um vikuna aftaná skúlatíð hjá dreinginum.

Setunartíðin er frá 15.02.00 og fyribils til 31.12.00.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja til 31 48 22, Ragnhild Dahl.

Umsóknir mugu verða okkum í hendi í seinasta lagi 31.01.00 og skulu sendast til:

Almannastovuna
att. Ragnhild Dahl
Box 196
110 Tórshavn